## UTTAN ÚR HEIMI

## Ósemja í ES um sílatoll

Ætlanin var, at ES skuldi leggja revsitoll á síl úr Noregi hósdagin, men avgerðin bleiv útsett.

Arancha Gonzales, talskvinna hjá ES-nevndini, sigur, at avgerðin bleiv útsett, tí nøkur av limalondunum vildu hava betri stundir til at kanna uppskotið um at leggja revsitoll á ald norsk síl. Í norskum fjølmiðlum verður tað tulkað, sum at ósemja er ímillum londini, hvørt revsitollur skal leggjast á norsk síl ella ikki.

Tann sonevnda dumpingnevndin hjá ES hevur skotið upp, at revsitollurin á sílum úr Noregi verður 19,9 prosent. ES vil vera við, at norðmenn seldu síl fyri undirprís í 2001 og í 2002. Hesum hevur norska alivinnan víst aftur, og nú avgerðin um revsitollin er útsett, fara norðmenn at nýta høvi til at gera enn eina roynd at sannføra ES um, at talan var ikki um undirprís, skrivar Aftenposten.

## Heldur niðri á Jørðini

Fyrrverandi amerikanski varaforsetin Al Gore fer illa við ætlanunum hjá George W. Bush, forseta um at seta fólk upp á Mánan og síðani upp á Mars.

– Heldur enn at nýta ovurhonds nógvar pengar upp á eina ætlan um at gera tað liviligt hjá nøkrum fáum fólkum úti í rúmdini átti forsetin at lagt dent á at gera tað liviligt hjá komandi ættarliðum her á Jørðini, sigur Al Gore. Hann er nú ikki tann einasti, sum heldur lítið um rúmdarætlanina hjá Bush. Bæði amerikanskir og evropeiskir fjølmiðlar rista við høvdinum og siga ætlanina vera at oyðsla pengar burtur.

Stóra blaðið New York Times væntar, at útreiðslurnar til eina slíka ætlan verða størri, enn tey flestu geva sær far um. Blaðið vísir á, at stórt hall er á amerikonsku fíggjarlógini, og at amerikanararnir hava nógv annað og týdningarmeiri at brúka pengarnar til.

## Ein kinesari

Kinesiska stjórnin hevur nú gjørt av, at Kina skal taka lut í friðarvarðveitandi arbeiðinum í Afghanistan.

Men hóast sít stóra fólkatal sendir Kina bara ein mann til Afghanistan. Hann eitur Zhang Ming og starvast sum løgreglumaður í landspartinum Hainan, har hann yvirhøvur arbeiðir við rúsevnissmugling. Sambært almennu tíðindastovuni Xinhua skuldi hann fara til Afghanistan í gjár.

Kina sendir sjáldan herfólk ella løgreglufólk til ófriðarlig øki, sjálvt um ST biður landið um hjálp, men hví Kina bara sendir ein mann til ST-deildirnar í Afghanistan, er ikki greitt. Sum er eru 21 kinesiskir løgreglumenn í ST-arbeiði í Eystur Timor og í Liberia.

## Fór til USA

Kolombiski rúsevniskongurin Arcangel de Jesus Henao Montoya, sum varð tikin í Panama fyri nøkrum døgum síðani, varð mikudagin sendur til USA, sum hevði biðið um at fáa hann útflýggjaðan.

Henao Montoya verður hildin at vera næstovasti í einum tí størsta rúsevnisharkaliðnum í Kolombia. Sambært amerikonsku myndugleikunum er hetta harkaliðið tann størsti kokainframleiðarin í heiminum, og amerikanararnir hava leingi leitað eftir Henao Montoya, tí hann skal hava staðið á odda fyri kokainflutninginum úr Kolombia til USA.

Tá tað frættist, at myndugleikarnir í Panama høvdu tikið Henao Montoya, kravdu teir kolombisku myndugleikarnir at fáa fatur á honum, men kortini bleiv avgjørt at senda hann til USA. Tað er lítið at ivast í, at hann verður dømdur lívlangt fongsul har, skrivar Reuters.

# Tropiskir fiskar koma norðureftir

**Sjógvurin á teimum norðaru leiðunum er vorðin so nógv heitari enn fyrr, at fiskur úr teimum tropisku leiðunum leitar norðureftir. Men samstundis rýmir annar fiskur.**

UMHVØRVI

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Danskir fiskifrøðingar og lívfrøðingar rópa nú varskó. Fiskur og plantur í teimum tropisku økjunum eru á veg til Norðurevropa, tí hitin í sjónum á okkara leiðum er vaksin munandi.

Granskararnir siga, at á hvørjum ári flyta tropiskir fiskar og plantur seg 50 kilometrar longri norður. Orsøkin er sjóvarhitin. Kanningar hava víst, at sjógvurin í Norðsjónum og Skagerak er vorðin munandi heitari, og at hitin veksur skjótari, enn vísindin hevði roknað við. Eitt nú er sjógvurin í Skagerak umleið tvey stig heitari nú enn í áttatiárunum.

Víst verður á, at fleiri fiskasløg, sum ikki hava verið vanlig í donskum sjógvi, eru farin at gera vart við seg tey seinastu árini. Eitt nú hava danskir ídnaðartrolarar fiskað nógvar ansjósir.

Men sjóvarhitin fær ikki bara fisk at koma hendanvegin sunnaneftir, tí verður sjógvurin her ov heitur, kann tað hava við sær, at fiskasløg, sum hava verið vanlig her, fara at leita sær aðrastaðni.

– Vit vita, at toskur heldur bara til í sjógvi, sum er umleið 10 hitastig. Hitin í Norðsjónum er um 9,8 stig, og tí kann hetta enda við, at toskurin har hvørvur, sigur lívfrøðingurin Ulrik Christian Berggren við Jyllandspostin.

Fiskifrøðingurin Brian MacKenzie á donsku fiskirannsóknarstovuni sigur við blaðið, at fiskur hevur lætt við at flyta, og heldur hitabroytingin fram, fara fleiri fiskasløg at flyta seg. Summi fara at hvørva fullkomiliga, og onnur fara at koma ístaðin fyri. Hann væntar, at avleiðingarnar verða tær somu fyri skeljadýr og plankton.

Í danska fiskimannafelagnum verður málið tikið í størsta álvara. Carsten Krogh, sum er fiskifrøðingur hjá fiskimannafelagnum, sigur við Jyllandspostin, at upplýsingarnar hjá lív- og fiskifrøðingunum samsvara við tað, sum fiskimenninir síggja. Hann nevnir, at ein ídnaðartrolari úr Esbjerg landaði 400 tons nú um dagarnar, og at 70 tons vóru ansjósir.

# Bush fekk ikki frið at leggja krans




*Bush, forseti, leggur krans á grøvina hjá Martin Luther King. Kvinnan á myndini er einkjan eftir borgararættindasstríðsmannin, Coretta Scott King*

**Fleiri hundrað svartir amerikanarar róptu rakstrarróp eftir Bush, forseta, tá hann legði krans á grøvina hjá Martin Luther King**

USA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Á forsetavalinum seinast fekk George W. Bush minni enn tíggju prosent av atkvøðunum frá teimum svørtu í USA, og at hann ikki er væl lýddur teirra millum, fekk hann at kenna, tá hann fyrradagin var í Atlanta og legði ein krans á grøvina hjá borgararættindastríðsmanninum Martin Luther King, sum varð myrdur í 1968.

Martin Luther King hevði fylgt 75 hósdagin, og tí var forsetin komin at leggja ein krans á grøv hansara. Men fleiri hundrað svørt órógvaðu vitjanina við rakstrarrópum sum "Bush go home" og "peace not war". Summi teirra bóru skelti, sum søgdu, at tey vildu heldur hava forsetan at brúka pengar til bústaðir enn kríggj, og á øðrum skeltum varð funnist at forsetanum, tí fólk hildu hann misnýta grøvina hjá Martin Luther King í valstríðnum upp undir forsetavalið í heyst.

Nr. 11 - 17. januar 2004 Sosialurin 


























